# Ólukka kundi hent

**Tveir menn vóru í Føroya rætti leygardagin, skuldsettir fyri at stolið ein bil, koyrt fullir og stolið annað eisini. Annar fekk fongsulsrevsing í 14 dagar, hin varð varðhaldsfongslaður í 14 dagar**

Randi Jacobsen

Seinnapartin fríggjadagin fór ein maður við bili eitt ørindi til eini hús á Glyvrum. Hann ætlaði ikki at steðga, sløkti motorin, men í ósketni gloymdi hann at taka lykilin úr bilinum.

Beint sum hann skuldi fara út aftur, kom róp í, at tveir menn vóru farnir við bilinum.

Fólk høvdu sæð tveir fullar menn ganga og hyggja inn í bilar fram við vegnum. Tá ið teir so su, at lykilin stóð í einum bli, settu teir seg í hann og koyrdu við fullari ferð avstað og rendu inn í ein annan bil.

Eygnavitni hava greitt frá, at bilurin hevði nógva ferð, og fleiri ferðir vóru teir um at koyra inn í mótkoyrandi biar og settu tí fleiri fólk í lívsvanda.

Teir hildu ferðina fram til Søldarfjarðar, koyrdu eitt petti víðari og runnu ur bilinum.

Tá ið bileigarin og onnur komu, vóru menninir á veg inn í ein annan bil. Bilførarin á tí bilinum hevði boðið sær at koyra teir til skipi teirra, sum lá í Fuglafirði. Hesin bilførarin visti ikki um tilburðin frammanundan og var tí í góðari trúgv.

Politiið kom og tók menninar.

Leygardagin vóru menninir í rættinum. Annar fekk dóm beinanvegin, 14 dagar inn at sita og krav um endurgjald. Hin maðurin varð varðhaldsfongslaður í 14 dagar.

# Kvørnin komin

Randi Jacobsen

Tey, sum granska ætt og hava røtur á Sandoynni, kunnu hava gleði av nýggjastu *Kvørnini* hjá




Sands Fornminnafelag.

Familjan í gamla býlinginum á Reyn á Sandi er útgreinað aftur til 1600-árini. Ein grein er um minnisvarðan í Skopun og teir sjólátnu, og ein um bøndurnar í Dalsgarð í Skálavík upp gjøgnum tíðirnar.

Í greinini um húsini á Reyni og undir Reynum verður m.a. greitt frá, hvussu lítið kvinnur vóru virdar. Onkur fór ónevnd í grøvini, og ein einkardóttir slapp ikki at arva jørðina eftir páp-an.

*Kvørnin* prentar eisini Hundatáttin, sum varð yrktur í Skopun fyri smáum 100 árum síðan. Hetta er ein stuttligur, men eisini álvarsamur táttur, sum m.a. lýsir viðurskiftini millum ognarar og ognarleys.

Nakað er um meslingarnar, sum gingu í Føroyum í 1846.

Blaðstjóri á *Kvørnini* er Ólavur Clementsen.

# Stór gáva til bróstkrabbagranskingina

**Kekkurin frá Stjørnuni við 60.000 krónum á varð handaður Bót til bata og Krabbameinsfelagnum sunnudagin**



*Vegna Stjørnuna handaði Kristoffur Ragnarsson Heidi Hvidbro stóra kekkin*

Mynd: Norðlýsið

Randi Jacobsen

Stjørnan og VB spældu í KÍ-høllini sunnudagin, og í steððginum trinu Heidi Hvidbro, forkvinna í Bót til bata og Kristoffur Ragnarsson, formaður í Stjørnuni út á gólvið.

Kristoffur Ragnarsson handaði tá Heidi Hvidbro kekkin við peninginum, sum kom inn, tá ið Stjørnan og Kyndil spældu í Klaksvík. Øll atgongumerkjasølan fór til innsavningina, umframt at feløg, fyritøkur og einstaklingar lótu pening.

– Tað var so vakurt, at inn komu smáar 60.000 krónur, men ungu dómararnir sunnudagin, Magnus í Króki og Thomas Juul Thomsen spýttu í, so kekkurin kom upp á 60.000 krónur, sigur Heidi Hvidbro.

Hon heldur innsavningina vera eitt gott prógv um, at fólk veruliga eru til reiðar at hjálpa, og ein so stór upphædd ger veruliga mun. Alur peningurin fer óskerdur til bróstkrabbagranskingina á Landsjúkrahúsinum.

Umframt kekkin fekk Heidi Hvidbro handaða eina av blusunum, sum stjørnukvinnurnar spældu í móti Kyndli. Ein hvít blusa við ljósareyðusloyfuni á. Allar stjørnukvinnurnar høvdu skrivað navn sítt á blusuna, sum Krabbameinsfelagið fær.

Hugskotið til innsavningina fingu spælararnir í Stjørnuni, tí ein av fremstu leikarunum teirra, Annika Karlsdóttir Ljósstein hevur bróstkrabba, og tær vildu stuðla liðfelaganum og granskingini á henda hátt.

Annika Karlsdóttir Ljósstein er í viðgerð fyri bróstkrabba, men tað forðaði henni kortini ikki í at spæla við, tí hon er ein stríðskvinna.

# Bíða eftir hinum feløgunum

**Smáu fakafeløgini á almenna arbeiðsmarknaðinum fara ikki til samráðingar, so leingi sum stóru feløgini eru í seming**

Randi Jacobsen

1. juli søgdu tey sjey smáu feløgini á almenna arbeiðsmarknaðinum sáttmálar sínar við Fíggjarmálaráðið upp. Tey sjey feløgini eru Almanna- og heilsuróktarafelagið, Bioanalytikarafelagið, Ergoterapifelagið, Fysioterapeutfelag Føroya, Føroya Psykiatrifelag, Kost- og føðslufelag Føroya og Ljósmøðrafelag Føroya.

Av tí at tey einki frættu aftur, bóðu tey Fíggjarmálaráðið um fund, og hesin fundurin var hósdagin í seinastu viku.

– Vit bóðu un fundin fyri at vita, hvat Fíggjarmálaráðið ætlaði. Við at siga upp 1. juli var tað eitt tekn um, at vit vóru til reiðar at koma til samráðingar, sigur Majbritt Mohr vegna tey sjey feløgwini.

Smáu feløgini ætla tó ikki at hava felags samráðingar.

Hesi feløgini hava verið ótolin eftir at sleppa til samráðingar, men nú samráðingarnar hjá stóru ffeløgunum eru slitnaðar, og semingsmenn komnir uppí, halda tey tað vera líka frætt at bíða.